# Blottari tikin í SMS

**Løgreglan í Havn tók hósdagin ein 41 ára gamlan menn, sum hevði vísti seg beran fyri eini 11 ára gamlari gentu í SMS**

BLOTTARI
*Eyðun Klakstein*

Stutt aftan á døgurða í gjár, varð løgreglan í Havn boðsend at koma í SMS, har ein blottari hevði víst fyri sær.

Ein 11 ára gomul genta, sum var í SMS saman við pápa sínum, var farin á toilettið, og tá hon kom út aftur, stóð ein maður og vísti seg beran fyri henni.

Løgreglan varð boðsend, og pápin fór við gentuni at leita eftir manninum. Tá løgreglan kom á staðið, sá gentan mannin fara upp í eini hýruvogn, og so vóru løgreglumenninir skjótir í vendingini og fingu fatur á manninum.

– Tað er møguligt, at maðurin hevur víst seg beran fyri øðrum fólki í SMS í gjár, og um nakar hevur verið úti fyri líknandi hending, kann viðkomandi venda sær til okkum, sigur Bergleif Brimvík, kriminalkommiserur.

### Kenningur hjá løgregluni

Maðurin, sum varð tikin, er 41 ára gamal, og løgreglan kennir hann í sambandi við líknandi mál áður.

– Vit kundu handtaka hendan mannin, tí vit fingu boðini beinan vegin. Koma boðini ikki beinan vegin, so kann tað vera trupult at finna lógbrótaran, sigur Bergleif Brimvík.

41 ára gamli maðurin er skuldsettur fyri brot á revsilógina, og løgreglan fer í næstum at skriva eitt ákærurit. Revsirammman í slíkum málum er alt frá eini bót og upp í fýra ára fongsulsrevsing.


## Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflyggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Fýra politistar skulu setast í 2003.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/9-2002





†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra kona mín, mamma, omma og vermóðir okkara

**Snæbjørg Ørvarodd**
Tórshavn

andaðist hósdagin, 49 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin 28. juli kl. 13.00. Sungið verður úr sálmabókini.

**Dalfinnur**

Tey, ið vilja minnast Snæbjørg, kunnu lata eina gávu til Astma- og Allergifelagið, konto í peningastovnunum

## Tøkk

Hjartaliga takka vit skyldfólki, vinum og øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Ove Venned**

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Niels Paula Danielsen fyri góð og troystarrík orð. Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til Eiler Rasmussen fyri sera vakurt hornspæl.
Ein serlig tøkk til tykkum á Hotel Tórshavn fyri tíðina, vit vóru har, og til Øssur Berghamar fyri vitjanir og góð orð, bæði niðri á Ríkissjúkrahúsinum og heima.
Tøkk til deild M og heimarøktina fyri umsorgan og linna.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur, og tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Óluva**
**Hans Jákup, Sigrid, Sigfríður, Martin við familju**



# Urtagarðarnir eiga at koma fólkinum til góðar

URTAGARÐAR
*Rúnar Reistrup*



Edmund Joensen, løgtingsformaður, er sjálvur urtagarðsmaður og fegnast dagliga um gomlu embætismannaurtagarðarnar í Havnini. Hann metir at urtagarðarnir áttu at verið meira opnir, soleiðis at teir komu almenninginum betur til góðar.

- Havnin rúmar nakrar ógvuliga vakrar urtagarðsperlur, og tær eiga at koma fólkinum betur til góðar, heldur Edmund Joensen, løgtingstingformaður.

Edmund Joensen hevur sjálvur stóran áhuga fyri urtagørðum, og er eisini ein teirra, ið dagliga fegnast um urtagarðsperlurnar í Havnini.

- Eg gangi nógv millum løgtingið og løgtingsskrivstovuna, og tá komi eg framvið hesum vøkru urtagørðum, sum hava ligið har í yvir hundrað ár. Hesir eru ein dýrgripur, og teir áttu at verið meira atkomiligir, sigur Edmund Joensen.

### Skipað viðurskifti

Í ólavsøkublaðnum, sum Sosialurin gav út herfyri, varð nortið við teir mongu vøkru urtagarðarnar í Havnini, og heitt var á avvarðandi myndugleikar og urtagarðeigarar um at lata garðarnar upp fyri almenninginum, soleiðis at øll kunnu fáa gleði av teimum.

Eftir at hava lisið greinina, hevur Jan Cristiansen, borgarstjóri í Havn givið til kennar, at eftir hansara meting áttu garðarnir kring donsku embætisbústaðirnar, Fútagarðin, Dómaragarðin og Amtmansgarðin, at verið latnir upp fyri almenninginum.

Edmund Joensen er samdur í, at garðarnir eiga at vera latnir upp, men hann leggur dent á, at hetta eigur at gerast undir sera skipaðum viðurskiftum.

- Vit mugu ikki taka garðarnar niður. Vit mugu minnast til, at orsøkin til at urtagarðarnir eru so vakrir og stórslignir, er neviliga, at teir hava ligið innibyrgdir av gørðum.

### Duga ikki at virðismeta gripirnar

Garðarnir hava sambært Edmundi Joensen havt avgerðandi týdning, bæði reint praktiskt og meira súmbolskt.

- Garðarnir verja fyri vindinum, og uttan garðar, hevði vøksturin ikki verið tann, sum hann er. Harumframt meti eg, at garðarnir ígjøgnum tíðina hava vart økini, har urtagarðarnar liggja, ímóti at verða fyrilitaleyst umgjørd til asfalterað parkeringspláss, sigur Edmund Joensen, og vísir á, at vit føroyingar ongantíð hava verið serliga raskir at ansa eftir okkara dýrgripum.

- Okkara skrivaða søga liggur í Íslandi, og okkara forngripir hava ligið í Danmark til nú, teir eru komnir heim aftur, tí vit her í Føroyum ikki hava dugað at virðismett hesar gripir. Høvdu teir verið verandi í Føroyum, høvdu teir helst ikki verið til longur. Soleiðis vænti eg eisini at tað er við urtagørðunum. Høvdu teir ikki verið innibyrgdir og riknir av teimum embætismonnum, sum har hava livað, høvdu teir helst verið parkeringspláss ella byggigrundir nú. Tað er nakað nýtt, at føroyingar rættiliga eru farnir at virðismeta slíkt, sigur Edmund Joensen, sum vónar at almenningurin skjótt fer at fáa atgongd til teir gomlu embætismannagarðarnar.





Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855



## Grannskoðanarleiðari við hugsjónum



Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 181 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á grannskoðanardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

Verandi leiðari av innanhýsis grannskoðanini tekur við aðrari spennandi avbjóðing í Føroya Sparikassa. Vit søkja tí eftir eftir nýggjum grannskoðanarleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Høvuðsuppgávan hjá innanhýsis grannskoðanini er at grannskoða ársroknskapin hjá Føroya Sparikassa, dótturfeløgum og Sparikassagrunninum. Grannskoðanin verður framd samsvarandi góðum grannskoðanarsiði og við atliti til galdandi lóggávu, reglur og viðtøkur. Grannskoðanin verður framd í samstarvi við uttanhýsisgrannskoðanina. Arbeiðið fevnir eisini um ráðgeving, eitt nú innan grannskoðan, roknskap og skatt.

Føroya Sparikassi vil skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, har samstarvsevni, nærlagni, effektivitetur og slagkraft eru tíðandi eginleikar. Dentur verður lagdur á, at innanhýsis grannskoðanin er virðisøkjandi í sínum arbeiði.

Umsøkjarar skulu hava eina ástøðiliga útbúgving, ið krevst fyri at gerast statsautoriseraður ella skrásettur grannskoðari. Eisini skulu umsøkjarar hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði í minsta lagi í 3 ár seinastu 5 árini.

Grannskoðanarleiðarin verður settur av nevndini í Føroya Sparikassa P/F.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Øssur S. Nolsøe, grannskoðanarleiðari
e-mail: ossur.nolsoe@sparikassin.fo
tlf.: 348560

Umsóknarfreistin er 15. august. Umsókn við C.V. og avriti av prógvum skal sendast til:

Føroya Sparikassi P/F
Att.: Hr. Petur Zachariassen,
nevndarformaður
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

Reproz · 319450